# Samanhald og vilji løgdu lunnar undir mentanar-húsi



*Signar á Brúnni, fyrrv. tingmaður og landsstýrismaður saman við øðrum góðum fólkum til vígslu í nýggja mentanarhúsinum í Fuglafirði*

*Mynd Jan Müller*

MENTANARHÚS
*Jan Müller*

At áhugin fyri sjónleiki, tónleiki og sangi og øðrum mentanargreinum altíð hevur verið stórur í Fuglafirði ásannar fyrrverandi tingmaðurin úr bygdini og fyrrverandi landsstýrismaðurin Signar á Brúnni, nú nýggja mentanarhúsið verður tikið í nýtslu.

Snotuliga húsið, sum tikið er í nýtslu, boðar somuleiðis frá einum sterkum vilja og einum góðum samanhaldi í Fuglafirði, uttan tað varð málið ikki nátt heldur hesin ein tann mest virkni politikarin úr bygdini í mong mong ár.

Sjálvur hevur hann verið við í hesum arbeiði so ella so og hann ásannar, nú húsið stendur liðugt, at tað hevur hevur tikið sína tíð. Sjálvur hevði hann við málið at gera, tá spurningurin um bygging av mentanarhúsi varð reistur.

- Minnist meg rætt, var tað í 1986, at tosað varð um at fáa stovnsett eitt felag í bygdini, ístaðin fyri fleiri, sum tá vóru, við tí endamáli at lyfta í felag og fáa reist eitt hóskandi mentanarhús í bygdini. Sjónleikarafelagið átti um tað mundið væl av peningi, meðan bygdafelagið átti ikki ta stóru rúgvuna, men var eitt virkið felag. Hetta eydnaðist eftir, at nógvir fundir vórðu hildnir. So varð farið til verka.

Signar á Brúnni heldur, at Fuglafjørður hevur verið so heppin at eiga Niels Midjord, ið allir føroyingar kenna frá vísusangi, men vísir á, at hesin maður kann so nógv annað – hann er ein fjølbroyttur mentamaður.

- Uppskot um hús teknaði hann og modell gjørdi hann eisini og øllum dámdi uppskot hansara. Sjálvur hevði eg nakrar fundir við landsins myndugleikar um projektið, og teimum dámdu eisini projektið hjá Nielsi. Játtaður varð studningur eftir lógini um bygdarhús, ið eg sjálvur hevði lagt á tingborð, fyri nú mongum árum síðani, og kommunalu myndugleikarnir vístu málinum stóran áhuga, bæði sitandi og undanfarna býráð, so alt sá ljóst út.

So varð farið til verka, og mong vóru tey, ið løgdu bæði tíð og orku í hetta mál. Ein av dyggastu stuðlunum mundi vera Willy Jan Feilberg, ið er byggikønur og var Nielsi ein hollur stuðul.

Signar á Brúnni, sum fegnast saman við bygdamonnum sínum, ásannar, at drúgv tíð er liðin, síðani tankin varð føddur, og til dagin í dag, nú húsið stendur liðugt, men allir fuglfirðingar eru væl nøgdir við úrslitið, og nógvir eru teir, ið hava rætt eina hond í samband við byggingina.

Sjálvur hevur hann alla tíðina lagt stóran dent á, at nevndin, ið hevur við byggingina at gera, setti ein leiðara nóg tíðliga, so greiðar reglur verða gjørdar um, hvussu húsið skal nýtast.

- Vit eiga at leggja dent á, at allir fuglfirðingar eiga at fáa gleði av húsinum. Tað skal nýtast til tónleik, sjónleik, listaframsýningar, sang, føroyskan dans, kristiligar fundir o.m.a. soleiðis sum ætlanin varð upprunaliga.

Signar heldur sjálvur, at gøtumaðurin, sum er settur til at standa fyri húsinum – hálvur fuglfirðingur, sonur Sonju hjá Kittuni og Harald, Jonhard Hammer, er rætti maðurin. - Tað verður ein stór og krevjandi uppgáva løgd á hann, og tað er av alstórum týdningi at fáa eina so góða byrjan sum møguligt. Hann skal ikki vera einsamallur um hetta, men fuglfirðingar eiga at stuðla honum væl í arbeiðinum.

Í síni tíð sum landsstýrismaður tosaði Signar á Brúnni mangan við stjóran í Norðurlandahúsinum, Helgu Kjørvar, har tey eisini komu inn á møguleikarnar hjá mentanarhúsinum í Fuglafirði at fáa í lag eitt samstarv við Norðurlandahúsið, ið kundi styrkja mentanarvirksemi í Fuglafirði, sum jú umfatar alla Eysturoynna. Teimum tankunum tók hon fult undir við og var beinanvegin til dystin fús.

- Fyri ikki bert fuglfirðingar, men fyri allar eysturoyingar, er mentanarhúsið í Fuglafirði ein stórhending. Nú eru karmarnir skaptir, nú er at fylla teir út sigur Signar á Brúnni í viðmerking til stórhendingina, at mentanarhúsið stendur klárt og liðugt.



*Formaðurin fyri Fuglafjarðar Sjónleikarafelag hevur júst handað Niels Midjord, arkitekti og Jonhard Hammer, nýggja leiðaranum av húsunum blómur*

*Mynd Jan Müller*



*Jórun Høgnesen og Dávur Winther handað formanninum í sjónleikarafelagnum Eyðun Hansen stásiligan málning eftir Edward Fuglø "Bond"*

*Mynd Jan Müller*



# Flogfarið stóð klárt

**Hósdagin í síðstu viku var ein dramatisk hending á flogvøllinum. Meðan ferðafólkini fara í flogfarið, fær stjórin í Atlantic Airways boð frá landssjúkrahúsinum um, at ein sjúklingur skal flytast til Ríkissjúkrahúsinum í skundi**



*Tað var sera heppið, at flogfarið hjá Atlantic Airways stóð klárt á flogvøllinum, tá ein sjúklingur hevði tørv á skjótum flutningi til Keypmannahavnar hósdagin*

SJÚKRAFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*

Skjótt varð borið at og øll ferðafólkini vórðu koyrd úr flogfarinum, og sjúklingurin fingin umborð. Hann var í skundi fluttur til Keypmannahavnar, har hann kom undir læknahond. Tað stóð um lív í hesum førinum, og tí var einki annað at gera enn at senda ferðafólkini úr flogfarinum.

Tað var so heppið henda dagin, at flogfarið júst stóð klárt á flogvøllinum, tá boðini frá landssjúkrahúsinum komu til Atlantic Airways. Hetta stytti nógv um tíðina, sum tað tekur at flyta ein sjúkling úr Føroyum til Keypmannahavnar. Tá talan er um bráfeingis sjúkraflutning sum henda, var tað av alstórum týdningi, at sjúklingurin slapp av landinum beinanvegin.

## Skuldi til Billund

Annars hevði sjúkrahúsið skulað sent boð eftir einum ambulansuflogfari úr Danmark, og hetta hevði tikið nógv longri tíð. Av sjúkrahúsinum verður sagt, at flutningurin gekk ómetaliga skjótt.

Flogfarið skuldi upprunaliga til Billund, men hesin túrurin var av ongum. Ístaðin sluppu ferðafólkini við flogfarinum hjá Maersk til Billund tveir tímar seinni, so seinkingin hjá teimum var ikki ovurhonds stór.

70 ferðafólk vóru umborð á flogfarinum hjá Atlantic henda dagin. Tá tey høvdu sett seg í flogfarið og gjørt seg til reiðar at fara, fingu tey boðini frá flogskiparanum yvir hátalaran, at tey skuldu úr aftur. Tey fingu tó greið boð um, hvat var á vási.

# Havnarmeistarar gjørt sáttmála



*Havnarmeistarar og havnarumsjónarmenn hava nú fingið nýggjan sáttmála, sum var undirskrivaður týsdagin 25. juni. Hann skal nú góðkennast av Fíggjarmálaráðnum*

**Havnarmeistarar og havnarumsjónarmenn hava fáa eina lønarhækkan á 9,5 prosent, nú nýggjur sáttmáli er undirskrivaður**

SÁTTMÁLI
*Stefan í Skorini*

Týsdagin 25. juli varð sáttmáli undirskrivaður millum Skipara- og Navigatørfelag og kommunalu arbeiðsgevarafeløgini (Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KA) og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag (FKA)) um havnarmeistarar og havnarumsjónarmenn.

Sáttmálin er nú sendur til lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar, áðrenn hann kemur í gildi frá 1. mars 2002.

Lønarhækkingin hjá havnarmeistarum og havnarumsjónarmonnum er tilsamans 9,5 prosent. 6 prosent verða løgd afturat lønini frá 1. mars í ár, og lønin hækkar aftur við 3,5 prosentum 1. januar í 2003.

Sáttmálin er galdandi fyri havnarmeistarar og havnarumsjónarmenn, sum eru limir í Føroya Skipara- og Navigatørfelagi og eru starvssettir við Runavíkar, Fuglafjarðar og Sørvágs havn. Aðrar kommunur í FKA og KA kunnu velja at seta havnameistara ella havnaumsjónarmann eftir hesum sáttmála.

## Maður skuldsettur fyri harðskap

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Ein ungur maður fyrst í 20-unum er nú skuldsettur fyri harðskapin, sum fór fram í Klubbagarðinum leygarmorgunin.

Menn fóru til hendurs, og endin var, at ein maður varð sligin niður. Hann fekk eina fliku og breyt eina tonn. Hesin maðurin var á løgreglustøðini leygardagin og meldaði tilburðin. Løgreglan hevur síðani gjørt sínar avhoyringar, og ein maður er skuldsettur fyri harðskapin, upplýsir vakthavandi á løgreglustøðini.